# Umsitingarfólk til maskinverkstað

Fyri eina fyritøku í Streymoynni søkja vit eftir dugnaligum fólki at taka sær av at samskipa fyrisitingarligu uppgávurnar á maskinverkstaðnum. Maskinverkstaðið bjóðar fram tænastur innan umvælingar av maskinum og motorum, umframt smiðjuarbeiði. Á verkstaðnum starvast 8 fólk, men virkið hevur eisini annað virksemi, so tilsamans eru 35 fólk í virkinum.

**Arbeiðsuppgávur:**

Starvið er fjølbroytt og sjálvstøðugt. Viðkomandi kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við verandi verkstaðsleiðara, og skal virka fyri at arbeiðsuppgávur og avtalur verða samskipaðar - eisini fyrisitingarliga. Starvið inniber í høvuðsheitum hesar uppgávur:

- at menna sølu- og tænastuavtalur og veita verandi kundum eina góða tænastu.
- at hava eitt gott og positivt samskifti við kundar, sum venda sær til fyritøkuna.
- at útvega eykalutir til verkstaðið.
- at fyrisita arbeiðsseðlar og tímanýtslu, umframt aðrar uppgávur, ið náttúrliga hoyra til umsitingarliga partin av verkstaðsleiðsluni.

**Umsøkjarar:**

Vit søkja eftir einum persóni, ið er positivur og ágrýtin, hevur evni at samstarva við onnur og ikki er bangin fyri nýggjum avbjóðingum.

Vit vænta, at tú í minsta lagið hevur hesar førleikar:

- Tekniskt innlit og kunnleika um motorar helst arbeiðsroyndir
- Kann taka ábyrgd við støði í ásettum heimildum
- Dugir at nýta teldu og ymisk telduforrit
- Dugir at orða teg á enskum og donskum bæði munnliga og skrivliga
- Fer væl um og kann samskipa arbeiðsuppgávur við skili
- Er tænastusinnað/ur

Løn og setanartreytir verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Virkisráðgeving, Saltangará, telefon 44 95 91 og tosa við Duritu Djurhuus ella Símun Hammer. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 1. februar 2004.

Hevur hetta starvið tín áhuga, so send eina umsókn til: Virkisráðgeving, Postrúm 26, FO-600 Saltangará og merk brævið "Umsitingarfólk til maskinverkstað"

Virkisráðgeving Spf

Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðskuskipanir

Heimasíða: http://www.konsult.fo

# Goymslumaður/ Húsavørður

Søkt verður eftir røskum manni at arbeiða á Hjalla. Tann, ið settur verður, kemur at hava ábyrgdina av goymsluni inni og eisini á plássinum uttanfyri.

Á innanduragoymsluni eru m.a. smærri amboð, eykalutir, el-lutir. Uttandura eru størri amboð, formar, jarn, v.m.

Goymslumaðurin skal vera røkin, duga at viðlíkahalda smáamboð og arbeiða sjálvstøðugt.

Hevur hetta tín áhuga, vinarliga send eina skrivliga umsókn til

**P/F J & K Petersen,**
á Hjalla · FO-188 Hoyvík
Tlf. 315060 · Fax 314194
e-mail: jkp@jkp.fo

# Bilur til sølu

Reyður Mazda 6, 5 hurðar, 1.8, 122 HK við sportfelgum.

Verður seldur við stórum avslátti.

**Tlf. 583388**

Alment Dansiskeið verður í Havn komandi vikuskifti
16. og 17. januar

**Dansað verður í Aulini á Studentaskúlanum í Hoydølum**

**Tilmelding á telefon:**
**221824 - 216082**
**ella 316080**
**Anna Kirstin**



HJÁ GUNLEIVI

# Arbeiðsmaður

Søkt verður eftir røskum arbeiðsmanni, at hjálpa til í bakarínum skiftandi vaktir.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
Tlf. 59 88 38 ella 31 21 61

# Løgtingsvalið

**Valkort**
Til løgtingsvalið, sum verður 20. januar 2004, verða valkort send veljarum í kommununi.

Um onkur, sum heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal viðkomandi siga frá hesum á kommunuskrivstovuni í seinasta lagi 15. januar 2004, kl. 18.00.

**Brævatkvøður**
Veljarar í Hvalbiar sóknar kommunu, sum sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni.

Veljarar í Hvalba og Sandvík, ið vegna sjúku ikki eru førir fyri at koma á valstøðini, og sum ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða frá hesum við at ringja í Hvalba tlf. 375206 og í Sandvík tlf. 375231 í seinasta lagi 19. januar 2004 kl. 18.00.

**Valið**
Í Hvalba verður valt í skúlanum á Vilsnarbrúgv
Í Sandvík verður valt í skúlanum

**týsdagin 20. januar 2004**

Atkvøðugreiðslan fer fram frá kl. 10.00 til kl. 20.00 elal til støðgur kemur í eftir kl. 10.00.

**Hvalbiar sóknar kommuna**

# Reingerðing

av Felagsskúlanum á Oyrarbakka verður hervið boðin út. Byrjað verður 1. mas 2004.

Felagsskúlin ætlar at gerast grønur skúli, og vaskað verður við tilfari úr mikrotrevjum.

Nærri upplýsingar um treytir o.a. fáast við at venda sær til Felagsskúlan á tlf. 42 20 84.

Møgulig tilboð skulu vera Felagsskúlanum í hendi í seinasta lagi 26. januar 2004 kl. 15.00.

Felagsskúlin skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomin tilboð ella einki at taka.

Oyrarbakki, 14. januar 2004

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**
FO-400 Oyrarbakki
Tlf. 42 20 84 · Fax 42 21 57

# Kunngerð

Gjørt verður kunnugt, at valkort til nýtslu við løgtingsvalið í Klaksvíkar kommunu týsdagin 20. januar 2004 eru send øllum veljarunum, ið standa á vallistanum.

Veljari, ið ikki fær valkort ella fær valkort við villum í, eigur at venda sær til býráðsskrivstovuna skjótast gjørligt.

Klaksvík tann 14. januar 2004

**Klaksvíkar býráð**
**Fólkayvirlitið**
Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík • Tlf. 456388




# Blaðfólk

Á høvuðsredaktión okkara á Argjum er eitt spennandi, avbjóðandi og fjølbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini, men møguleiki er tó eisini fyri uppgávum kring landið, har vit hava lokalredaktiónir í Klaksvík, Sandavági, Sandvík og við Saltangará.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum 1. februar komandi, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta.

Vit rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvsetanini.

Lønin er sambært sáttmála millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á telefon 341 800. Ella á teldupostadressuni, jan@sosialurin.fo.

Seinasta freist at søkja starvið er mánadagin, 19. januar, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

**Sosialurin**
Jan Müller
Postsmoga 76
100 Tórshavn

Sosialurin

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið.
Á Sosialinum starvast í dag umleið 30 fólk.

**Peter Qvortrup Geisling frá "Lægens Bord" verður í Norðurlandahúsinum leygardagin 31. januar kl. 15.00 og á Hotel Norð sunnudagin 1. februar kl. 19.00. Atgongumerkir til Norðurlandahúsið kunnu keypast í Norðurlandahúsinum og á Kunningarstovuni. Atgongumerkini til Hotel Norð kunnu keypast á Statoilstøðini í Klaksvík.**



## MÅNEDENS BUKET

Í samband við at Peter Qvurtrup Geisling frá "Lægens Bord" vitjar Føroyar síðst í januar, kunnu allir føroyingar nú innstilla onkran í Føroyum, til at fáa "Månedens Buket".

Kennir tú onkran innan fyri tað føroyska heilsuverkið, sum tú heldur hevur útmerkað seg á ein serligan hátt, so kanst tú innstilla henda persón.

Tað kann verða ein lækni, sjúkrasystir, portørur, heimasjúkrasystir, heimahjálpari, o.s.fr. Eisini kunnu fólk innstillast, sum hava t.d. lagt eitt stórt arbeiði í ein serligan felagskap ella uppgávu.

Ein serlig nevnd hyggur ígjøgnum øll innkomin brøv, og verður "Månedens Buket" handað á fyrilestrinum, sum verður í Norðurlandahúsinum 31. januar 2004.

Skriva navnið á tí persóninum, sum tú heldur hevur uppiborið eitt heraklapp, og hví tú heldur at júst hesin skal hava hetta blómutyssi.

## SPURNINGAR TIL "LÆGENS BORD"

Hava tygum onkran áhugaverdan spurning um heilsu- og heilsurøkt, - ella um okkurt heilt annað, ið tygum ynskja at seta sjónvarpslæknanum frá Lægens Bord, so kunnu tygum senda hann til IRIS.
Teir mest spennandi og áhugaverdu spurningarnir, verða svaraðir á fyrilestrunum.

**IRIS**
Postsmoga 240 · FO-700 Klaksvík
Tel 456390 og 216390 · Fax 456391
teldupostur: iris@iris.fo
heimasíða: www.iris.fo